Vikublaðið Sosialurin





# Stórt jólatiltak í Vági

**Stórt jólatiltak verður í Billardhúsinum í Vági sunnudagin, har alskyns lutir og góðgæti eru at til sølu, umframt at livandi tónleikur og ymisk spøl, so sum lutaseðlasøla og meksikansk uppboðssøla eru á skránni**

JÓLATILTAK
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Sunnudagin 2. desember verður stórur jólamarknaður við árasølu, lutaseðlasølu og meksikanskari uppboðssølu í Billardhúsinum í Vági.

Nógvir góður vinningar eru at vinna t.d. flogferðir, lamb, gás, kalvi, fartelefon, olja, gávurkort og mangt annað.

Á jólamarknaðinum verður eisini sølubúð við jólaprýði, góðgæti, køkum og øðrum heimagjørdum. Hjalmar Magnussen stendur á odda, tá livandi tónleikur eisini verður á skránni, og vitjandi kunnu keypa sær eplaskivur og gløgg ella kaffi og rís alamande.

Jólamarknaðurin, sum 7.a og 7.b í Vágs Skúla skipa fyri, letur upp kl. 17.00 sunnudagin í Billardhúsinum í Vági.

# Salli Lognberg 80 ár

Sunnudagin 25. november fylti ein vælkendur skopuningur 80 ár. Salli Lognberg er sonur Sommer og Sannu, sum var úr Havn, fødd Justinussen. Salli er giftur við Juttu, sum er ættað úr Húsavík.

Serliga minnist eg tíðina tá vit vóru børn, hvussu gott tað var at koma inn til Juttu og Salli, har var altíð borðreitt fyri okkum børnum. Vit føldu okkum altíð væl at koma inn til Juttu og Salli, tí tey vóru sera góð við børn, so tað var neyvan dagur at vit ikki vóru inni og vitjaðu. Omman og abbin búðu í einum parti av húsinum, so har í húsinum vóru altíð nógv børn. Vit føldu okkum altíð vælkomin.

Salli hevur verið og er ein sera virkin maður, Salli hevur verið av raskastu monnum bæði á sjógvi og landi.

Ikki eru havhesta byrðarnar fáar, ið hann hevur borið úr bakkanum. Jú Salli var hvørja løtu, sum hann kundi, við stongini. So um kvøldið bleiv skoldað, tá kundi vera nógv fólk, sum skoldaðu við. Stuttligt er at hoyra Salli siga frá bakkaferðum.

Sum frásøgumaður er hann av teimum bestu, hann hevur tað ikki frá fremmandum. Tær løtur tá okkurt serligt var, til dømis føðingardagar, sat man antin við spílaðum oyrum ella í skellilátri, tá Salli og ikki minst abbin søgdu frá ymiskum til gaman og álvara. Tað hevði verið dýrgripur at átt, um hetta var fest á band.

Salli hevur verið virkin á sjónum síðan hann sum 15 ára gamal, fór við »Borglyn« sín fyrsta túr. Salli sigldi eisini við »Borgini«, sum Torvald Hjelm átti og førdi. Salli var av bestu fiskimonnum við snøru, tá var tað sjálvdráttur og var hann altíð ímillum teir bestu og best at fiska.

Útróðurin í Ravn Stóroy royndi hann eisini við »Fiskakletti«, sum



systursonur hansara, Sommer Winther var formaður á. Tað tíðina tá skopuningar róðu út í Ravnsoynni var nakað serligt, tá hesir vøkru bátarnir fóru siglandi út úr havnini flaggskrýddir á veg til Grønlands. Og komu so aftur um heystið, so vakrir sum svanar siglandi inn í havnina. Jú, hesir føroyskt bygdu bátar, sum nú fækkast í tali, eru eitt sera føroyskt handverk, sum vit politikarar eiga at vísa virðing og stuðla, soleiðis at hetta handverk ikki fær mønustingin. Salli er enn virkin á sjónum, við bátinum hjá sær »Hemarin«, nú hann er fyltur 80 ár.

Í '69 keypti hann »Haraberg« sum var 30 tons, saman við beiggja sínum Ásmund Lognberg, Tórolv Poulsen, Eyðun Poulsen, Herman Winther og Ádvald Juul. Teir drivu tann bátin í nógv ár og fiskaðu væl. Salli var motorpassari á »Haraberg« øll árini. Tá teir seldu »Haraberg« mitt í 80'unum, keypti Salli glastrevjabátin »Hemarin«, sum hann róði nógv út við línu um vetrarnar. Smádreingir engdu í skúrinum. Sum onkur hevur sagt so beinrakið, at egningarskúrarnir vóru universitetini úti á bygdunum. Um so er, ja so hava verið og eru nógv av slíkum her í bygdini. Jú satt er tað at hesir menn, sum hava haft sín arbeiðsdag í bátunum, hava alt mangan ungling til mans.

Jú vit minnast virksemi á keiini fyri nøkrum árum síðani, allir skúrarnir vóru fullir av smádreingjum og eldri monnum, sum engdu. Dreingirnir komu úr skúlanum, taskan kom sum eitt lyn inn í gangin og síðan var kósin sett oman á keiina. Ofta var ilska inn á hesar dreingir, tí skúlating vóru forsømd, men atlíkavæl tá man hugsar um hesar dreingir, so eru teir komnir væl framm, vælskúlaðir við góðum úrslitum, so universitetini á keiini, ímillum sild og høgguslokk og fløktar stampar, hava givið nakað har hesir tilkomnu menn terpaðu sína vitan í hesar dreingir, sum vóru partvís grundarlag undir útróðrinum.

Nú er Salli farin um tey áttati, men sigast má, at hesin aldur sæst ikki á honum, sum rør út tá líkindi eru, og annars luttekur í øllum viðurskiftum her á landi, poltiskt hevur hann sína sannføring og í missiónshúsinum er hann virkin.

Góðu tit, Jutta, Hendrik, Karina og abbabørnini hjartaliga tillukku við pápanum, verpápanum og abbanum. Og enn einaferð hjartaliga tillukkku og Guds signing í komandi døgum.

# Jógvan á Høvdanum 70 ár

Tann 1. desember, verður pápi okkara 70 ár. Í tí sambandinum havi eg hug at hyggja eitt sindur aftureftir, eftir tí, hesin megnar maður hevur fingið av skafti, nú hann rundar tey sjeyti.

Pápi er elstur av fýra systkjum og gjørdist hann faðirleysur sum 10 ára gamalur. Foreldur hansara vóru Oluffa Samson Joensen, ættað av Strondum og Petur Hans Samson Joensen úr Gerðum í Klaksvík, pápin doyði fyri 60 árum síðani og mamman í 1996.

Smá vóru korini tá í tíðini, men tey hava klára sítt alla tíðina og hava svarað hvørjum sítt. Hetta hevur hann lært nógv av og tað er hetta, ið alla tíðina hevur ligið fremst í huganum hjá pápa og tað er at klára seg sjálvan.



Sigur man Jógvan á Høvdanum, so sigur man eisini Klaksvíkar Timburhandil. Har arbeiddi hann í yvir 50 ár og er tað hansara verk, at Klaksvíkar Timburhandil gjrdist ein av teim størstu timburhandlunum í Føroyum. Hann hevur verið tann, sum hevur stýrt øll árini, bæði í góðum og ringum tíðum. Við hansara vitan innan byggivinnuna, hevur hann megna at givið Norðoyingum byggitilfar av bestu góðsku. Hann gekk ógvuliga høgt uppí, at góðskan skuldi vera í lagi og at Klaksvíkar Timburhandil skuldi hava so stórt úrval av vørum sum gjørligt.

Tikið var mangan til orðafellið tá leitað var eftir einhvørjum, sum ikki fekst í øðrum handlum, so "fær norður á Varpið, tí teir hava tað heilt sikkurt".

Í 1994 eydnaðist tað okkum at keypa Klaksvíkar Timburhandil og tað má vera ein tann størsti dagurin í lívinum hjá pápa. Nógv stóð á monnum, ti nógv stóð uppá spæl. Timburhandilin hevur altíð verið eitt arbeiðispláss hjá familjuni, og bleiv hann stongdur, kundi tað fáa óbotandi skaða fyri familjuna. Tíðirnar vóru sera ringar í Føroyum júst tá og arbeiðsloysið var stórt. Vit fundaðust í húsunum hjá Advokatfelagnum við Ósaskúlan og eftir drúgvar samráðingar við peningastovnarnar, JFK og sakførarar, eydnaðist tað okkum at fáa fatur á Timburhandlinum. Minnist væl, tá ið sakførarin Jógvan Páll Lassen segði, at nú, tá ið tit fara út higani, so kunnu tit kallað tykkum eigarar av Klaksvíkar Timburhandli, nakað, pápi hevði droymt um alt sítt lív og tað týdningarmesta, at hann fekk bjarga sínari familju og arbeiðsfólkunum.

Í 1995 fekk pápi ein blóðtøpp í hjartað, tað tók hart uppá hann, men stríðsviljan hevur hann altíð havt góðan og tað eydnaðist honum at vinna seg upp aftur.

Pápi er perfektionist, har alt skal passa uppá millimetrar. Hann er sera dugnaligur í hondunum og tað sum hann hevur gjørt, kann ongin seta ein fingur á aftaná. Hann hevur hjálpt okkum børnunum við húsum okkara og húsini á Helnabrekku hevur hann bæði tekna og hevur staðið fyri allari byggingini. Tína hjálp eru vit øll tær takksom fyri.

Pápi hevur altíð havt nógvar góðar vinir. Næstan hvønn sunnudag spælir hann krokk í skúlagarðinum og har hevur hann havt nógvar góðar løtur. Hann gongur sera høgt uppí bátarnar hjá sær, har hann ígjøgnum árið pjøssar um teir og nakrar túrar um árið, verður eisini farið á flot. Í kjallaranum hevur hann eitt hobbyrúm, har hann gerð modellskip, hornprýðislutir o.a., har fara nógvir tímar um vikuna.

Privat hevur tú altíð bjóðað tað besta fram, tá ið tit hava havt gestir og øll, sum eru komin á gátt í Jørundsgøtu hava kent seg sum heima. Tykkara heim hevur altíð verið opið fyri øllum og har hava mong sitið væl.

Til seinast vil eg minna á, at "aftanfyri ein góðan mann, er altíð ein góð kona", tí uttan hennara hjálp og stuðul, so vart tú neyvan komin so langt, sum tú ert komin ídag. Hon er heimsins besta mamma og hevur hon altíð tikið familjuna framum alt annað. Takk fyri tað mamma.

Við hesum orðum vilja vit ynskja tær tillukku við 70 ára føðingardegnum. Tær og mammu verður ynskt alt tað besta í framtíðini.

Samstundis verður sagt frá, at pápi heldur føðingardagin saman við familjuni í Århus.

Tillukku pápi

**frá okkum systkinunum.**
**Símun á Høvdanum.**